# Kanna møguleikan fyri dagtilboði til heimleys

*- Tað ber ikki til, at lata heimleys ganga og mæla á gøtuni dagin langan, sigur leiðarin av Herberginum hjá Frelsunarherinum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Heimleys, sum bara hava Herbergið hjá Frelsunarherinum at dúva á, mugu verða úti allan dagin, tí Herbergið er bara opið um náttina.

Men hetta ber ikki til, heldur leiðarin á Herberginum.

- Nógv av fólkunum, sum gista hjá okkum, eru ikki før fyri at ganga og mæla í 12 tímar hvønn dag, og tí eigur tað at verða ein skylda hjá samfelagnum at bjóða teimum okkurt stað at verða um dagin, sigur Niels Edvard Olsen.

- Vit hava ikki fíggjarliga orku til at hava opið um dagin eisini, men vit kanna møguleikarnar fyri at gera eitt dagstilhald fyri heimleys, so uppskotið í minsta lagi er har, sigur hann.

## Tað sum ber til

Herbergið hjá Frelsunarherinum letur upp klokkan 10 á kvøldi, og 12 tímar seinni seinni skulu gestirnir verða úti aftur.

- Tað, sum vit bjóða teimum heimleysu, er eitt minstakrav, og tað sum vit eru før fyri at bjóða, sigur Niels Edvard Olsen, sum hevur eitt starvsfólk afturat sær.

Tórshavnar kommuna og landið gjalda samanlagt 450.000 krónur til lønir hjá teimum, sum starvast á Herberginum. Harafturat koma leiguinntøkur frá teimum, sum eru fastbúgvandi á Herberginum, og tað fer til raksturin av húsinum.

- Tá vit so eisini fáa onkrar gávur, melur raktsturin so nøkunlunda runt, sigur Niels Edvard Olsen.

## Alneyðugt við dagtilboði

At heimleys ikki kunnu halda til á Herberginum um dagin ger, at tey verða noydd at ganga og mæla í Havnini frá morgni til kvøld.

- Summi hava kanska okkurt vinfólk at fara til, men nógv ganga bara og mæla, og handilslívið er til dømis misnøgt við hetta.

- Eitt er, at tey heimleysu ganga á gøtuni, nú vit hava havt eitt sera gott summar, men støðan hjá teimum gerst rættiliga vónleys, tá veturin kemur við kulda og kava. Tað er alneyðugt við einum dagtilhaldi, so tey hava onkrastaðni at fara í vetur, sigur Niels Edvard Olsen, leiðari á Herberginum.

## Dagar á gøtuni

Í leygardagsblaðnum greiddi 56 ára gamli og heimleysi Martin Eliassen frá, at hann hevði trupult við at verða úti so leingi, tí hann er illa gongdur og heilsan er vánalig.

- Eg plagi at fara á bóksavnið at lesa bløðini, men har ber ikki til at verða sitandi fyri dagin. Onkuntíð eri eg á farstøðini ella koyri eina løtu í einum býbussi, greiddi Martin Eliassen frá.



*- Eitt er, at tey heimleysu ganga á gøtuni, nú vit hava havt eitt sera gott summar, men støðan hjá teimum gerst rættiliga vónleys, tá veturin kemur við kulda og kava. Tað er alneyðugt við einum dagtilhaldi, so tey hava onkrastaðni at fara í vetur, sigur Niels Edvard Olsen, leiðari á Herberginum* *Mynd: Jens Kristian Vang*

- Eg kann ikki leggja meg á nakran bonk, tí so kemur løgreglan og sigur, at eg má ikki sova á einum bonki í býnum.

Martin er ikki einsamallur. Nógv onnur heimleys verða noydd at verða úti allan dagin, og nú veturin stendur fyri durðum eru tey rættiliga farin at stúra fyri tilveruni.

# Kommunurnar fáa einki gjørt

*Vit hava eina moralska skyldu, men tað er landsmyndugleikarnir, sum hava løgfrøðisligu ábyrgdina av teimum heimleysu, sigur formaðurin í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráð*



*Vit hava eina moralska skyldu at hjálpa, men tað eru landsmyndugleikarnir, sum hava løgfrøðisligu ábyrgdina av teimum heimleysu, sigur formaðurin í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráði*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

EYÐUN KLAKSTEIN

Fólk kring alt landið gerast heimleys, men stórur partur av teimum flytir til høvuðsstaðin, har Herbergið hjá Frelsunarherinum er einasta og seinasta loysnin hjá mongum.

Hetta hevur fingið fólk at skjóta kommunum kring landið í skógvarnar, at tey gera ikki nóg mikið fyri at loysa trupulleikan hjá teimum, sum eru komin illa fyri og ongastaðni hava at búgva.

Í næststørstu kommununi í landinum, Klaksvíkar kommunu, viðurkenna tey, at tey hava einki tilboð til tey, sum standa uttan hús og heim.

- Vit vita væl, at vit hava eina moralska skyldu mótvegis hesum fólkum, men løgfrøðisliga eru tað landsmyndugleikarnir, sum hava ábyrgdina av teimum heimleysu, og tí fáa vit einki gjørt. Tað er her veruligi trupulleikin er at finna, sigur Jógvan Lützen, formaður í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráð.

## Vilja yvirtaka

Í Sosialinum leygardagin var prát við Martin Eliassen úr Klaksvík, sum ongan fastan bústað hevur, og sum stundum má sova úti undir opnum himni. Hann kendi seg noyddan at flyta úr Klaksvík til Havnar, tí hann fekk ongan innivist í Klaksvík.

- Eg havi ikki hug at viðgera einstøk mál, men kanska vísir hetta einstaka málið júst, at trupulleikarnir eru teir somu í Havn, sum teir eru hjá okkum, sigur Jógvan Lützen.

Hann sigur, at eitt samt býráð hevur mælt til, at kommunan yvitekur sosiala øki frá landinum, og sum eitt tað fyrsta mælir hann til, at kommunan fær møguleikan at loysa mál, har fólk eru komin illa fyri og standa uttan fastan bústað.

- Men hóast vit hava boðið okkum til at gingið undan á hesum økinum, hava vit einki svar fingið frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, sigur formaðurin í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráð.

## Almenn uppgáva

Jógvan Lützen heldur, at tað er væl skiljandi, at privatum, sum av ymiskum sosialum orsøkum eru vorðin heimleys.

- Tað er ein almenn uppgáva at syrgja fyri, at fólk, sum eru komin illa fyri, fáa eitt tilboð um hjálp. Og landsmyndugleikarnir eiga eisini sum skjótast at finna út av, hvussu heimleys an Lützen.

- Klaksvíkar kommuna tekur gjarna ábyrgdina av hesum øki, og so skulu pengar sjálvandi fylgja við, og vit mugu fáa eina lógarheimild til afturhalda pengar fyri leigu. Men so leingi sum vit einki hava fingið at vita frá Almanna- og Heilsumálastýrinum, kunnu vit ikki seta pengar av á fíggjarætlanini, sigur Jógvan Lützen.

Hann heldur, at loysnin á trupulleikunum hjá teimum heimleysu er at gera heim, har hesi fólk kunnu búgva.

- Men vit eiga ikki at gloyma, at íbúðarneyðin er stór allastaðni, og at bæði familjur, lesandi og onnur hava trupult við at finna sær eina íbúð. Tey veikastu eru sjálvandi fyrstu tapararnir, men nógv fólk hava trupult við at finna sær íbúð. At Klaksvíkar kommuna tekur hendan íbúðartrupulleika í størsta álvara, er ætlaða byggingini av eldraíbúðum undir Kráarbrekku eitt gott dømi um, sigur Jógvan Lützen.



# Helena ger mun á sjúkrahúsunum

*- Landsstýrismaðurin í heilsumálum gerst frekari og frekari, og umframt allar trupulleikarnar, hon hevur vavt seg inn í á øðrum økjum, fær hon sær nýggjar trupulleikar, heldur Jógvan við Keldu, løgtingsmaður*




*Jógvan við Keldu vil í almennum fyrispurngini hava at vita, hví landsstýrismaðurin í heilsumálum ger mun á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum*

EYÐUN KLAKSTEIN

Jógvan við Keldu, løgtingsmaður og partur av sitandi samgongu, spyr nú í almennum fyrispurningi Helenu Dam á Neystabø, landsstýrismann, hví hon ger mun á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum.

- Landsstýrismaður hevur nú so ofta prógvað, at hon misskilur sína uppgávu sum landsstýrismaður, sigur ein bersøgin Jógvan við Keldu í fyrispurningi sínum.

Hann vísur á tvær samrøður um sjúkraflutningsbilar, sum landsstýrismaðurin í heilsumálum hevur havt við Dimmalætting.

## Ger mun á sjúkrahúsum

Onnur samrøðan var í mai mánaði í ár, eftir at ein sjúkrabilur í Klaksvík var steðgaður upp undir neyðsendarørindum.

Í samrøðuni verður Helena Dam á Neystabø endurgivin fyri at siga: „At Klaksvíkar Sjúkrahús hevur ikki prioriterað sjúkrabilarnar nóg høgt kann ongantíð vera mín trupulleiki.“

- Tað vil siga, at sjúkrabilurin skal haldast innfyri játtanina, sum hon vildi hava at vera 2,2 milliónir lægri enn løgtingið samtykti, sigur Jógvan við Keldu í fyrispurninginum.

Leygardagin sigur Helena Dam á Neystabø um sjúkrabil, sum Landssjúkrahúsið hevur ábyrgd av: „Vit væntaðu, at sjúkrabilarparkin fór at klára seg, men ein bilur megnar ikki meir. Men pláss er ikki fyri einum nýggjum sjúkrabili við inniverandi játtan. Tí má ein bráfeingis játtan fáast til vega. Og hetta verður ikki greitt fyrr enn í næstu viku“.

- Her sigur landsstýrismaðurin við øðrum orðum, at tað gerst ikki við, at sjúkrabilurin ikki er á játtanini, vit skulu bara finna eina eykajáttan, vísir Jógvan við Keldu á.

## Einki mark

Jógvan við Keldu heldur, at landsstýrismaðurin við hesum ger mun á sjúkrahúsunum, og hann heldur, at landsstýrismaðurin hevur misskilt sína uppgávu, fyri ikki at siga misrøkt hana.

- Mær tykir, at okkara landsstýrismaður í heilsumálum gerst frekari og frekari, og umframt allar trupulleikarnar, sum hon hevur vavt seg inn í á øðrum økjum, fær hon sær nýggjar trupulleikar. Her tykist ikki nakað mark at vera fyri, sigur Jógvan við Keldu.

Hann setir tí Helenu Dam á Neystabø tríggjar fyrispurningar, sum hann vil hava svaraðar í bløðunum.

## Spyr hví munur er á

Í fyrsta lagi spyr Jógvan við Keldu, hvør munurin er á einum sjúkraflutningsbili á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landsskjúkrahúsinum.

Hann vil eisini hava at vita, um landsstýrismaðurin í heilsumálum eigur at vera landsstýrismaður hjá bæði Klaksvíkar Sjúkrahúsi og Landssjúkrahúsinum.

Og so spyr Jógvan við Keldu, hvussu ein landsstýrismaður í tveimum eins málum kann útleggja annað sum „vánaliga prioritering, sum ongatíð kann vera landsstýrismansins trupulleiki“, meðan tá talan er um annað sjúkrahús, so „má hon syrgja fyri at finna henda pening við eini eykajáttan, men at tað ikki kann vera klárt fyrr um einar 14 dagar“.

Jógvan við Keldu endar fyrispurningin við at spyrja, hvat partamenninir hjá Helenu Dam á Neystbø siga um hesa vanvirðing av av Klaksvíkar Sjúkrahúsi og starvsfólkunum har.

Svarar Helena Dam á Neystabø ikki fyrispurninginum í bløðunum, ætlar Jógvan við Keldu at seta meira neyvan fyrispurning í løgtinginum.

# Kyrrahavslaksur fingin í Føroyum



*Kyrrahavslaksurin verður kallaður kúlulaksur*
*Mynd Jens Kr. Vang*

Í august vóru tver laksar av slagnum kúlulaksur (Pukkellaks DK) ella „Pink salmon“ (Oncorhynchus gorbuscha) veiddir við tráðu í Kaldbaksbotni. Kallfiskurin hjá hesum laksaslagnum hevur eina kúlu oman á rygginum, ið veksur fram, tá ið hann skal upp í ánna at gýta. Hesin laksur er bert at finna í Stillahavinum, men varð settur út av russum í 70 árunum, uppi í Barentshavinum. Møguliga er hetta laksur, ið hevur klárað seg í teimum russisku og norðurnorsku áðunum síðani tá, og er nú farin at ferðast á víðum havi. Hesin spurningur verður kannaður í løtuni.

Fiskirannsóknarstovan vil fegin hava at vita, um fleiri laksar av hesum slagnum eru veiddir her í ár. Um so er, kunnu tit venda tykkum til Rógva Mouritsen ella Jan Arge Jacobsen á telefon 315092.

Í Stillahavinum búnast hesin laksur aftan á 2 ár í sjónum, og meginparturin doyr aftaná gýtingina. Hann er at finna bæði í vestara (Russiska) og eystara partinum (Amerikanska og Canadiska) partinum av Stillahavinum.

## Russar slept út

Orri í Islandi, kendi laksamaðurin er ikki fegin um kúlulaksin, fremmanda gestin. Hann sigur at eir hava eisini fingið slíkan laks í Íslandi. Hann er sera illur inn á Russar, sum hava sett henda laksin út.

Lesið eisini Sosialin á Internetinum
www.sosialurin.fo

# Gamal sleipibátur undir nýggja tænastu



Mánadagin kom eitt nýtt far í føroyska flotan. Tað er ein brúktur sleipibátur, sum er keyptur úr Aalborg og hann hevur fingið bíbilska navnið Goliat. Felagið Faroe Towing Company hevur keypt bátin og Páll Klein er skipari.

Báturin fer at røkja allar vanligar uppgávur sum verða kravdar av einum sleipibáti. Hann er sera væl egnaður at sleipa og flyta størri skip.

Ætlanin er at seta ein stóran krana í bátin og tí fer hann á sleipistøð í næstum. Goliat er útgjørdur við bógskrúvu, hevur heimstað í Havn og siglir 10 míl. Tveir manns vera við bátinum.


